Aftur eitt deyvablað

Deyvablaðið er komið út fyri aðru ferð í ár. Í blaðnum er ein sera áhugaverd grein um eina føroyska kvinnu, Karen Pauline Weishaupt, fødd Hansen (1900—1957), sum misti hoyrnina sum smágenta. Hon var gávurik, dugdi væl at tekna og mála og arbeiddi á Den Kongelige Porcelænsfabrik í Danmark. Maður Paulinu var eisini deyvur. Tey vóru bæði tvey virkin og komu eisini nógv í deyvafelagið í Keypmannahavn, har tey búðu.

Tað mesta tilfarið í blaðnum er annars umsettar greinir um viðurskiftini hjá deyvum aðrastaðni. Tvær greinir eru um oynna Martha's Vineyard nærindis eysturstrondini á Massachusetts. Har vóru óvanliga nógv deyv fólk, men tey vóru ikki tilsiðissett. Samfelagið var alt lagað eftir, at so nógv fólk vóru deyv, og øll fólkini lærdu teknmál.

Av øðrum í blaðnum kann nevnast søgan um Helen Keller, 2. partur, barnasíður, spurnarkapping, 26 persónligir spurningar til Levi Niclasen, sum er blaðstjóri á Deyvablaðnum.

Deyvablaðið kostar 15 krónur. Árliga haldaragjaldið er 30 krónur fyri fýra bløð.

Sett síni spor

AEG AEG AEG

AEG akku-bore/-skruemaskine ABS 13 RL

Fæst um alt landið

Kr. 2:475,-

- 10 trins indstilling af drejningsmoment
- 9.6 V batteri nok til f. eks. 420 skruer i træ
- 1 times hurtiglader
- Bits kan monteres direkte i spindel
- 13 mm borepatron
- Lev. med transportkasse

Fæst á hesum støðum:
Klaksvíkar Timburhandil 55149
KMB-handilin Klaksvík 56717
J. O. Andreasen Strendur 47142
Maskinhandilin Saltangará 47777
Stanley Oyrarbakka 22270
Amboð- & Maskinhandilin í Vágum 33555
Eldhús Sandur 61002
Karl Jespersen Tvøroyri 71052
Thomas Dam Amboð & Mask. 10444

Minnist haldaragjaldið

einkultfløk hvørt sekund), vóru ikki isettir fyrr enn um miðjan mars (teir skuldu eftir ætlanini verið ísettar um miðjan desember) — og tá er svartkjaftadygdin sum kunnugt so vánalig, at hesin ein hin týdningarmesti parturin av royndunum varð at siga av ongum.

Nógv annað (eisini positivt!) átti her at verið nevnt um alt tað, ið fór fram í royndarskeiðnum, men sama hvat ið verður sagt í hesum landi, so verður tað tulkað í ringastu meining (og allar ringast um tú sigur okkurt, ið ikki stendur at lesa í pensu.n upp til 3. klassa í fólkaskúlanum), so best er at sleppa hesum endanum. Tó vil eg til tað, ið longu er nevnt, leggja aftrat, at persónliga hevði eg, so sum umstøðurnar vóru, eitt gott samstarv við landsstýrisins— »búskaparstjóra«, somuleiðis sum fiskivinnustjórin altið var fúsur at skifta orð við meg, tá eg helt at »nú bar av«.....Bert spell at jústhann, ið var »yvirskipari« fyri royndirnar, skuldi vera burturstaddur so stóran part av tíðini. Vegna manningina, er tað eisini rætt her at skoyta uppi, at samstarvið við landsstýrisins umboð umborð gekk væl seinastu 2-3 mánarnar av skeiðnum.

ÚRSLITIÐ?

Búskaparliga úrslitið av royndunum kann kanska best lýsast soleiðis:

Í tíðarskeiðnum januar/apríl í ár fiskaðu triggir av teimum mest nútimans svartkjaftatrolarunum í Vesturheiminum: »Polarfarið«, »Andrias i Hvannasundi« og »Skálafjall« svartkjaft sunnanfyri Føroyar.

Á somu fiskileiðum — millum okkara prúðu skip — lá ein »gamalur« umbygdur norskur kraftblokkabátur, »Uksnøy«, ið eisini troytti svartkjaftin. Verksmiðjan umborð á norska skipinum er tó nýggj og hon hevur somu flaka og farsmaskinu sum okkara trolarum. Munurin er bert ein: »Uksnøy« kann umframt at framleiða fars og flak eisini framleiða **surimi.**

Kanska fiskaðu okkara trolarir (tons pr troltíma) betri enn hin norski, men hvat hjálpur tað, tá gamli »Uksnøy« kortini fekk **meira** fyri sína framleiðslu (í høvuðsheitinum surimi) enn okkara triggir fingu **tilsamans!**

Ein tílík samanbering hevur sjálvandi nógvar aðrar síðir sum her ikki eru lýstar, men samanumtikið er myndin á góðari leið, og prógvar til fullnar, at surimiframleiðsla úr svartkjafti ikki er tann ørvitishugsjón, ið Óli Breckmann skýrir hana at vera.

Viðvíkjandi royndunum at skera **fløk uttan bein og skræðu** haldi eg, at vit í dag við vissu kunnu siga, at fyribils er henda framleiðslan einans lønandi fyri svartkjaft yvir miðalstødd, tvs. umleið 1/2 - 1/3 av fonginum.

2/3, ella har um leið, átti við fyrimuni at verið framleitt til surimi (ella fars, um prísirnir eru góðir), men tann minsti svartkjafturin helst átti at verið rundfrystur og nýttir sum alifóður. Longu næsta ár koma vit at framleiða o.u. 10.000 tons av alifiski, og krevur henda framleiðsla eina fóðurnøgd sum svarar til umleið 70.000 tons av rundum fiski.

Sjálvur meti eg at tað vildi verið ørskapur at slept royndunum nú, tí nú vita vit í hvussu so er við vissu:

1. Hvussu royndirnar **ikki** skuldi skipast.
2. At tað ber til at framleiða einkultfløk uttan bein og skræðu við vinningi.
3. At surimiframleiðslan er lønandi framleiðsla.
4. At um vit sleppa royndunum nú, so verða vit eftirbátar í mun til norðmenn og russar, við teimum fylgjum hetta kann koma at hava fyri okkum tá svartkjaftaveiðan verður kvoteraða landanna millum.
5. Royndirnar frá »Skálafjall« í summar benda á, at kongafiskaveiða á Reykjanesryggjinum kann gerast lønandi vinna, ta — tíðina av árinum (mars/august) tá svartkjafturin er rak og illa hóskandi til aðra framleiðslu enn fiskamjøl.

Eitt hitt týdningarmesta liðið í samband við allari framleiðslu — marknaðarkanningar — hevur at siga einki verið gjørt við enn, so her hanga eisini nógvir leysir endar, ið skulu flættast saman.

100-tals milliónir krónur hava verið nýttar til royndir at fáa annað enn fiskmjøl úr størsta tilfeingi okkara: Svartkjaftastovninum. Vit eru um at koma á mál — men knappliga tykist tað sum um menn hava fingið kaldar føtur vegna nakrar smáar sandmakkar og eitt ávist lítið prísfall á heimsmarknaðinum.

Hvar eru »knotirnar« vit kvøða um?

Tormóður Dahl